# Friðarlig umhvørvisvijtan






## Umhvørvisskipið Golfo Azurro legði seg týskvøldið út fyri Vestmanna, har ein partur av manningini ætlaði at gista

**Randi Jacobsen**

Tað er framvegis ikki greitt, hvørji ørindini eru í Føroyum hjá umhvørvisskipinum Golfo Azzurro.

Leygarkvøldið var skipið á Fuglafirði, og týsdagin sigldi tað inn í Eiðisflógva, har nøkur fólk fóru í land í Tjørnuvík við gummibáti.

Seinni fór skipið vestur eftir og legði seg út fyri Vestmanna. Aftur fóru fólk í land við gummibáti, og tað skilst, at nøkur teirra leitaðu sær eftir innivisti í Vestmanna.

Sambært heimasíðuni hjá skipinum, hevur skipið atferðartruplar unglingarumborð, men tann aldursbólkurin er ikki umborð á hesum túrinum.

Men sambært politinum er hetta ett umhvørvisskip hjá felagsskapinum Birgitte Bardot Foundation og er skrásett í Port Vila.

Manningin sigur, at tey eru ferðafólk og eru bara komin fyri at síggja landið.

Skipið boðaði ikki myndugleikunum frá, at tað kom, og tólini vóru sløkt.

Týskvøldið vóru politi og tollarar umborð og høvdu einki at viðmerkja.

Fyrrapartin í dag lá skipið framvegis út fyri Vestmanna.

*randi@sosialurin.fo*

# Timburhandil letur aftur

## Fríggjadagin verður lykilin snaraður um í deildini hjá Havnar Timburhandli í Vestmanna, og tveir menn missa arbeiðið

**Randi Jacobsen**

Tað gongu einki serligt í byggivinnuni, og tað noyðast eisini timburhandlarnir at sanna.

Havnar Timburhandil tók tí avgerðina at lata deildina í Vestmanna aftur. Tað hendir fríggjadagin.

– Úrvalið í einum timburhandli má vera stórt, og vit noyddust at velja ímillum antin at byggja út í Vestmanna ella at lata aftur, sigur Heini Fosaa, stjóri.

Havnar Timburhandil hevur seinastu trý árini leigað hjá Vest Pack í Vestmanna.

Tveir menn hava arbeitt á deildini í Vestmanna. Teir eru báðir uppsagdir men hava fingið í boði, at um meira verður at gera, kunnu teir fáa arbeiði hjá timburhandlinum í Havn.

Heini Fosaa heldur, at vestmenningar fara at fáa betri tænastu viiðvíkjandi vøruúrvalinum +ur sttóra handlinum í Havn.

Umframt handilin í Havn, hevur Havnar Timburhandil eisini handil á Kambsdali. Ongar ætlanir eru um at lata tann handilin aftur. Tann handilin er væl størri enn handilin í Vestmanna.

# Gera nýggja vatngoymslu

**Randi Jacobsen**


*Goymslan verður sprongd inn í ein hamara, og tað gevur grót*

Í vár byrjaði arbeiðið hjá Fámjins kommunu at gera nýggja vatngoymslu.

Nýggja vatngoymslan verður eitt gott petti frá, har verandi vatngoymsla er. Hon verður sprongd inn í ein hamara, og grótið verður brúkt til nýggjan veg yvir til skúlan.

Arbeiðið við vatngoymsluni er mett at kosta 700.000 krónur.

Í fyrsta umfari verður ikki gjørt reinsiverk, men vísir tað seg, at vatnið ikki er nóg reint, kann reinsiverk setast til, sigur Eyðdis Ellendersen, borgarstjóri í Fámjins kommunu.